

*Best í Føroyum innan 2009. Tað er málið, sum KÍ nú hevur sett sær. Fyrsti parturin av amboðunum í hesum varð kunngjørdur á tíðindafundi týskvøldið*
*Mynd: Norðlýsið*

verða í fyrsta lagi sponsorsáttmálar, og á tíðindafundinum kundi Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoyar Sparikassa, boða frá, at Sparikassin hevur játtað eina stóra upphædd, aftur fyri at verða høvuðsstuðul. Tøl vórðu ikki nevnd, men tað var ein errin stjóri, sum staðfesti, at talan var um eina upphædd, sum var einar tvær til tríggjar ferðir so stór, sum onnur føroysk fótbóltsfeløg fáa. Og er tað ræt, so liggur upphæddin helst væl og virðiliga røttu megin hálvu milliónina,

Hartil varð meira enn róð uppundir, at ein høvuðsstuðul afturat verður knýttur at felagnum, og so koma sjálvandi aðrir smærri - men fyri tað týdningarmiklir - stuðlar afturat. Alt í alt eitt grundarlag, sum skal tryggja, at KÍ í øllum førum skal hava fíggjarligu styrkina til at standa seg millum fremstu feløgini í toppinum av føroyskum fótbólti.

### Ítróttarliga grundarlagið

Fíggjarliga grundarlagið gevur sjálvandi yvirskot til eisini at arbeiða á øðrum frontum enn bara tað »at møta á politistøðini, tá rokningar eru sendar til innheintingar« sum tikið varð til. Og sum startskotið til nýggjar og betri tíðir hjá KÍ varð kunngjørt, ta Tony Paris nú aftur verður venjari hjá felagnum.

Talan er um ein fýra ára sáttmála, og merkir hetta altso, at visión 2009 tykist hanga fult og heilt saman við arbeiðinum, sum bretin kemur at útinna við stýrisvølin í KÍ. Fyrst og fremst, so verður arbeiðsøki hansara besta mansliðið, men eisini kemur hann at vera blandaður í arbeiðið at umskipa og tillaga felagið, eins og hann ætlandi eisini skal hava eitt orð at siga í ungdómsarbeiðinum.

Og Tony Paris er ikki hvør sum helst í Klaksvík. Tvær ferðir áður hevur hann verið venjari, og ikki minst munnu klaksvíkingar við gleði minnast í 1999, tá felagið vann greipuna undir leiðslu av bretanum. Og megnar hann at endurtaka hetta innan fyri tey fýra komandi árini, so er neyvan óhugsandi, at hann fær eina standmynd undir liðini av Kjølbro!



*Tað fer at krevja hart arbeiði og vilja at vinna, men Tony Paris er sannførdur um, at hann er maðurin, sum megnar at føra KÍ aftur á toppin*
*Mynd: Norðlýsið*

enn einaferð at vísa hetta. Og tað kann best gerast við at fáa KÍ upp aftur á tindarnar. Men fyrst skal eitt arbeiði gerast í ár. Hvør einasti spælari skal vita, at málið nú er at halda sær í deildini. Tað málið er sjálvum sær eins týdningarmikið sum nakað annað. Og mín áheitan til hvønn tann einasta spælara her er, at tann setningurin verður røktur bæði væl og virðiliga, segði Tony Paris at enda, áðrenn lógvabrestirnir enn einaferð rungaðu í hugnaligu KÍ-caféini.

# Skulu »branda« seg við KÍ

**Rimmar sponsoratið hjá Norðoya Sparikassa til KÍ er eins nógv ein spurningur um forrætning og branding sum tað er stuðul**

KÍ
*Jákup Mørk*

Hóast hann ásannar, at talan er um stórar upphæddir, so er stjórin í Norðoyar Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg, ikki í iva um, at sparikassin hevur handlað rætt, nú teir í tveimum atløgum eru við til at tryggja fíggjarliga grundarlagið undir KÍ. Fyrst við at bjarga felagnum undan ovur honds stóru skuldini, og síðani við at skriva undir ein stóran sponsorsáttmála. Ein sáttmáli, sum stjórin sjálvur segði vera væl størri enn nakar annar slíkur í føroyskum fótbólti.

### KÍ er samleikin

Útsagnirnar benda á, at talan er um ein sáttmála fyri nógvar hundrað túsund krónur um árið. Hevur KÍ og stuðulin til hetta eitt somikið stórt marknaðarføringsvirði fyri Norðoyggjar, sum jú er tykkara kjarnaøkið?

- Eg vil siga tað so, at KÍ er sjálvur samleikin í Norðoyggjum. Og tí er tað nærum altavgerandi fyri okkum sum fyritøku, at KÍ hevur tað gott. Hinvegin merkir avtalan ikki, at vit bara tveita eina rúgvu av pengum í føvningin á felagnum. Tað fylgja nøkur krøv við, um eg so má siga. Krøvini kunnu kanska ikki bara tengjast at úrslitinum, men eisini á tann hugburð og tey ideal, sum felagið og spælarar hava við sær í dysti.

Tað bendir eisini tann vegin, at tit í størri mun síggja hetta sum ein møguleika at »branda« tykkum, heldur enn bara sum ein lýsingarmøguleika?

- Tað er rætt. Tú hevur eisini sæð aðra staðni, at sterkar fyritøkur royna at tengja seg at sterkum feløgum, og tað er avgjørt eisini tað, sum vit hava í hyggju við hesum. Men tað krevur so sjálvandi, at felagið liggur í toppinum. Fólk vilja identifisera seg við vinnarar, og tað er tað, sum vit vilja uppnáa við hesum.

### Styrkja heimavøllin

Seinastu tíðina hevur Norðoya Sparikassi givið til kennar, at tey eisini ætla sær at víðka um landafrøðiliga virkisøkið. Sampakkar tað við hesa ætlan, at sparikassin nú nýtir somikið nógvar marknaðarføringskrónur í Klaksvík, heldur enn at koma til nýggju økini við hesum?

- Heilt avgjørt. Og tað er eisini partur av samlaðu strategiini, sigur stjórin.

- Tað er jú vanliga so, at áðrenn tú hugsar um at standa teg væl á útivølli, so mást tú hava ein sterkan heimavøll. Og tað er sum so tað, sum vit royna at gera við hesum. Tú kanst kanska siga, at vit við hesum vilja styrkja um akkerið, sum vit hava í Norðoyggjum, áðrenn vit fara undir avbjóðingar aðrastaðni.

### Vilja ikki eiga høllina

Við nýggju konstruktiónini, sum er grundarlag undir framtíðini hjá KÍ, gerst Norðoya Sparikassi eisini annar av eigarunum av einum felag, sum hevur til endamáls at reka KÍ-høllina. Hetta er sum so eitt spildurnýtt virkisøki hjá Sparikassanum, men Eyðfinn Reyðberg er tó skjótu at staðfesta, at hetta neyvan er nøkur varandi loysn.

- Tað er í øllum førum ikki víst, at talan verður um sama eigaraskaran í allar ævir.

Vil tað siga, at tit í eini ikki alt ov fjarðari framtíð vilja sleppa at selja tykkara ognarpart?

- Tað skal eg ikki siga her og nú. Men tann konstruktiónin er ein kreditorloysn, og vit tóku undir við henni, tí hon var ein neyðugur liður í arbeiðinum at tryggja KÍ fíggjarliga, segði sparikassastjórin at enda.